tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 22.02.2022 kl. 18:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 10/22 | 21/00588-6 | Spæliplássí Froðba - staðseting |
| 11/22 | 21/00385-2 | Uppskot til fríðkan av økinum við "Faktorhúsið" |
| 12/22 | 21/00076-1 | Ung í vikuskiftinum - uppskot um rusdrekkafrítt tilboð |
| 13/22 | 22/00100-3 | [redacted] (Lukka mál) |
| 14/22 | 21/00616-2 | [redacted] (Lukka mál) |
| 15/22 | 21/00627-2 | [redacted] (Lukka mál) |
| **Til kunningar** | | |
| 4/22 | 21/00622-1 | [redacted] (Lukka mál) |
| 5/22 | 22/00096-1 | Skattatøl 2022 |
| | | |

Kristin Michelsen lesur upp skránna og spyr um viðmerkingar eru til hesa. Ongin viðmerking er til skránna.

Til støðutakan

**<u>10/22</u>**
**<u>21/00588-6 Spælipláss í Froðba - staðseting</u>**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2022 | 20/22 |
| 2 Býráðið | 22.02.2022 | 10/22 |

**Málslýsing:**
Ynski er komin frá borgarum um eitt spælipláss í Froðba í 2021, og er peningur settur av á FÆ22.

**<u>Trivnaðarnevndin 18. Januar 2022:</u>**
Uppskot um spælipláss á matr. nr. 26b í Froðba. Málið verður beint í Fíggjarnevndina til støðutakan.

**Tilmæli:**
Tvøroyrar Kommuna eigur ikki nógv øki í Froðba, men matr. nr. 26b liggur sentralt og friðarligt, og mælt verður sostatt til at staðseta spæliplássið har.

**<u>Kommunustjórin 14.02.2022</u>**
Kortavrit matr.nr 26b, 1288m$^2$, ogn hjá Tvøroyrar kommunu.



**<u>Fíggjarnevndin 17. februar 2022:</u>**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini. Málið verður beint í býráðið.

**<u>Býráðið 22. februar 2022:</u>**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

## 11/22
## 21/00385-2 Uppskot til fríðkan av økinum við "Faktorhúsið"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 23.04.2021 | 13/21 |
| 2 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 13.12.2021 | 39/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 31.01.2022 | |
| 4 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 07.02.2022 | 7/22 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.02.2022 | 19/22 |
| 6 Býráðið | 22.02.2022 | 11/22 |

**Málslýsing Tekniskur leiðari 20-04-2021:**
Ynski er frá nevndarlimi at taka mál upp í nevnd um at fríðka økið kring Faktorhúsið.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 23. april 2021:**
Nevndin hevur einmælt samtykt at fríðka um økið við Faktorhúsið.
Byrjað verður við at taka burtur deyðgrasið og veitir verða eisini tiknar upp.

**Kommunustjórin 21. oktober 2021:**
Her er talan um 2 mál hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini fyri somu ætlan (21/00385 og 21/00529).
Mælt verður til at savna ætlanina um kringøkið við Faktorhúsið í mál «21/00385»

***Tekniskur leiðari:***
***Fyri at saman um og at málið liggur rætta stað eru broytingar gjørdar og eru allar samtyktir at finna her og verður mál 21/00385 nýtt til kringøkið við Faktorhúsið.***

**Málslýsing – Tekniskur leiðari 07.01.2021:**
Vísandi til punkt 21/00529, hevur tekniska deild biði um tilboð frá veitarum av parkour system. Samlað tilboð er komið frá einum veitara sum hevur rørskipan, fallundirlag og uppseting við.
Tekniska deild hevur eisini fingið prís frá lokalum veitara uppá rør skipan.

**Lógargrundarlag:**
Hjallur kann takast burtur. Eingi sáttmáli ella krøv eru viðvíkjandi hesi ogn.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fyri at nýta økið oman fyri Faktorhúsini skulu fyrireikandi arbeiði til at seta parkour system upp, og gøta gerast fyri at koma til parkour økini.
Harafturat skal lendi skipast so hettar kann haldast viðlíka og gras sláast.
Kannast skal um hvussu veitir og kloakk skal skipast.
Tilboð 432 hoyrir til uppseting, víst á "*Tvøroyri Parkour 2*", tvey stativ
Tilboð 430 hoyrir til uppseting, víst á "*Uppskot Tvøroyri Parkour* ", eitt stativ víst sum rail 1.
Tilboð, bara uppá stativ er víst "*BT Parkour stativ*"

**Tilmælið:**
Tekniska deild mælir til at tvey stativ vera sett upp, og at hesi eru staðsett, nær gongugøtuni sum skal gerast í bønum.
Stativ frá lokalum veitara eru ikki góðkend á sama hátt sum skipanini frá heildarveitaranum. Tó soleiðis at lidna dygdin frá lokala veitaranum er fult á hædd við eina heildarveiting.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 12. oktober 2021:**
Nevndin hevur einmælt samtykt at keypa stativ og undirlag sum er í tilboð 432. Stativ og máttur vera keypt í ár og sett upp í næsta ár.
Nevndin mælir til at taka hjallin niður og beinir málið í fíggjarnevndina viðvíkjandi niðurtøkuni.

**Kommunustjórin 16. september 2021:**
Avsettar eru kr. 120tkr. í íløu til spælipláss á FÆ2021, §317. Mælt verður til, at tilmælið hjá TUN -at taka hjallin niður og hvussu økið ynskist skipa-, verður við atliti til mál 21/00385 «Faktorhúsið og økið omanfyri», verður lagt fyri býráðið til samtyktar.

**Fíggjarnevndin 18. november 2021:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndin at keypa parkour útgerð í inniverandi ári. Fíggjarnevndin tekur støðu til hjallin á einum seinni fundi.

**Tekniskur leiðari – 02.12.2021:**
Keyp av lutum og stativum er bílagt og væntast at lutirnar eru í Føroyum áðrenn jól. Keypt er fyri kr. 120.584,- u/mvg.

**Kommunustjórin 16. september 2021:**
Avsettar eru kr. 120tkr. í íløu til spælipláss á FÆ2021, §317. Mælt verður til, at tilmælið hjá TUN -at taka hjallin niður og hvussu økið ynskist skipa-, verður við atliti til mál 21/00385 «Faktorhúsið og økið omanfyri», verður lagt fyri býráðið til samtyktar.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 13. december 2021:**
Tekniski leiðarin upplýsur at seniasta meldingin frá frá Innsport er at reiðskapurin er bílagdur og kemur til Føroyar umleið 20. desember 2021.

**Tilmæli til Fíggjarnevndina**
Trivnaðar- og umhvørvisnevndin gjørdi 12. oktober 2021 tilmæli til Fíggjarnevndina um at taka hjallin niður, og fíggjarnevndin gjørdi 18. november 2021 av, at tak støðu til hjallin á einum seinni fundi.
Málið verður nú aftur lagt til viðgerðar og samtyktar.



**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 07. februar 2022:**
Málið verður aftur beint í Fíggjarnevndina, við atliti til tilmælið um at taka hjallin niður.

**Tekniska deild 14. februar 2022:**
Viðm. til samtykt hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini 7/2-2022: Veitararnir eru klárir at seta parkour-spælipláss upp í mars , so avgerðin má takast um hjállin.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2022:**
Jónleyg J. Bech og Bjarni Hammer taka undir tilmælinum hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini. Kristin Michelsen tekur støða á býráðsfundinum. Málið verður beint í býráðið

**Býráðið 22. februar 2022:**
Einmælt samtykt at taka hjallin niður, samb. tilmælið hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini.

**12/22**
**21/00076-1 Ung í vikuskiftinum - uppskot um rúsfrítt tilboð**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 02.02.2021 | 6/21 |
| 2 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 09.11.2021 | 35/21 |
| 3 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 13.12.2021 | 41/21 |
| 4 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 18.01.2022 | 4/22 |
| 5 Fíggjarnevndin | 31.01.2022 | 14/22 |
| 6 Býráðið | 22.02.2022 | 12/22 |

**Málslýsing:**
Máli verður lýst á fundinum.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 02. februar 2021:**
Nevndin er samd um at eitt tilboð skal gerast til ung í vikuskiftinum. Tilboð er til ung frá 14 ár og uppeftir. Hølir mugu fáast til vega áðrenn hetta verður sett í verk og leita verður eftir hóskandi hølum. Næmingaráð í Tvøroyrar skúla og leiðarin í ungdómshúsinum verða við í eini tilgongd.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 11. maj 2021:**
Nevndin bleiv kunna um ognina við Valarabrekkuna 2 og ynskir at fáa upplýst hvat skal gerast av vanligum dagføringum og dagføringum í mun til brand.
Hvør er leigukostnaðurin.
Hvør skal taka sær av útreiðsliunum.
Hevur Blái Krossur eina støðulýsing av bygninginum.

**Málslýsing - Tekniskur leiðari 05-11-2021:**
Ynski er at fáa mál á skrá frá forkvinnuni, fyri at sóknast eftir høli til tilboð, til ung í vikuskiftinum.

**Lógargrundarlag:**
-

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið trivnaðar- og umhvørvisnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 09. november 2021:**
Einmælt samtykt at taka málið upp til FÆ22 og seta játtan av til at seta á stovn tilboð til ungdómin í vikuskiftinum.

**Tekniskur leiðari 02-12-2021:**
Ynski er at fáa mál á skrá, tá fleiri bygningar standa til sølu í løtuni, sum møguliga kundu verið nýttur til høli, til ung í vikuskiftinum.
Tveir bygningar standa til sølu inni hjá Meklarinum. Tað er tann hjá Suðuroyar Sparikassa og tann hjá "TipTop".

**Lógargrundarlag:**
-

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ikki viðgjørt.

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið trivnaðar- og umhvørvisnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 13. december 2021:**
Nevndin hevði keypini til umrøðu og var ikki undirtøka at arbeiða víðari við keyp av nevndu bygningum.

**Tekniskur leiðari 14-01-2022:**
Forkvinnan í trivnaðar- og umhvørsinevndini ynskir at posthús bygningurin verður nýttur til ungdóms tilboð.

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið trivnaðar- og umhvørvisnevndini og møguliga fíggjarnevndini/býráðnum til støðutakan.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 18. januar 2022:**
Forkvinnan hevur eitt tilmælið um at nýta fremsta rúmið í posthúsbygninginum til rúsfrítt tilboðið, til ungdómin í vikuskiftinum.
Tilmælið samtykt við tveimum atkvøður fyri. Anita og Jónleyg atkvøddu fyri og Kristina atkvøddi ikki.
Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Tekniskur leiðari 19-01-2022:**
Á fundi í trivnaðar- og umhvørvisnevndini bleiv tilmælið um at nýta part av posthúsbygniginum til rúsfrítt tilboð til ung í vikuskiftinum, samtykt.
Vísandi til kommunu stýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndin, málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 22. februar 2022:**
Atkvøtt var um tilmælið hjá Trivnaðar og umhvørvisnevndini, um at nýta part av posthúsbygniginum til rúsfrítt tilboð til ung í vikuskiftinum.
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech, Alvi Mortensen og Bjarni Hammer.
Ímóti: ongin
Blankt: Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest.

Atkvøtt verður um at annulera aðrar samtyktir viðv. nýtslu av posthúsbygniginum.
Fyri eru Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech, Alvi Mortensen.
Ímóti eru: Bjarni Hammer, Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddi ímóti.

Bjarni Hammer, Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest ynskja viðmerkt, at tey halda fast um at postabygningur verður brúktur til eitt avgreiðsluhøli og alment bókasavn.

[Gem]

**13/22**

**22/00100-3** [redacted] **(Lukka mál)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 08.02.2022 | 13/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2022 | 17/22 |
| 3 Býráðið | 22.02.2022 | 13/22 |

**14/22**

**21/00616-2** [redacted] **(Lukka Mál)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.11.2021 | 58/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 72/21 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.02.2022 | 11/22 |
| 4 Fíggjarnevndin | 17.02.2022 | 18/22 |
| 5 Býráðið | 22.02.2022 | 14/22 |

**15/22**

**21/00627-2 [redacted] (Lukka Mál)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 07.12.2021 | 113/21 |
| 2 Mentanarnevndin | 08.02.2022 | 7/22 |
| 3 Býráðið | 22.02.2022 | 15/22 |

**Til kunningar**

**4/22**
**21/00622-1 [redacted] (Lukka Mál)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 09.11.2021 | 99/21 |
| 2 Mentanarnevndin | 08.02.2022 | 6/22 |
| 3 Býráðið | 22.02.2022 | 4/22 |

**5/22**
**22/00096-1 Skattatøl 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2022 | 2/22 |
| 2 Býráðið | 22.02.2022 | 5/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.02.2022**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2021/2022

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2022/23**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður við hesum kunning um skattainntøkur latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til umrøðu/-støðutakan.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 22. februar 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

Fundurin lokin kl. 19:40

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen